# Islam – ein heimsreligión



Fyrsta suran í Koranini, mynd Wikipedia

A. GUTTORMUR DJURHUUS



### Islam og muslimar

Islam er navnið á religiónini, hvørs hornasteinur er Koranin. Islam merkir at geva seg undir. At lata alt upp til hin eina gudin at gera av. Hann ella hon, sum ger tað, er muslimur. Fyrr brúktu vit í Norðurlondum heitið muhammedanari fyri ein, sum er muslimur. Heitið muhammedanari kann kennast niðrandi fyri ein muslim og eigur tí ikki at verða nýtt.

### Islam verður útbreitt

Hann, sum leggur lunnar undir islam, var profeturin Muhammed, føddur 569 ella í 570 í Mekka og deyður í Medina mánadagin hin 8. juni í 632. Hann liggur grivin í Medina.

Í tíðini eftir deyða Muhammeds løgdu viðhaldsmenn hansara undir seg tað, sum eftir var av arabisku hálvoynni, Egyptaland, Palestina, meginpartin av Persiu og Norðurafrika. Eystur eftir fóru teir eisini í heilagt kríggj og vóru eftir fáum ártíggjum komnir til Punjab í India. Fyrst í sjeyhundraðtalinum høvdu muslimarnir tikið alt land fram við norðurafrikansku strondini, eystur til Gibraltar sund, og á sumri ár 711 varð farið tvørtur um til Spaniu, sum tá ikki var til, men var býtt í nógv smá kongaríki. Og har vórðu teir verandi í meira enn 700 ár. Umframt at breiða út religiónina, breiddu teir eisini út arabiska mentan og arabiskt mál. Arabiskt er í dag eitt av heimsins mest útbreiddu málum.

### Trúarjattánin og fyrsta suran

Islam er ein strong monoteistisk trúarlæra. Einfalda trúarjáttanin er soljóðandi:

"Tað er eingin gudur uttan Gud, og Muhammed er hansara sendiboð."

At gerast muslimur er einfalt. Tú sigur trúarjáttanina, um tú trýr henni, og tú er frelstur muslimur. Men hon skal berast fram á arabiskum: "La ilaha illa 'Ilah Muhammedu 'r-rsula 'Ilah." Annað mál kann ikki góðtakast.

Koranin er í vavi á stødd við Nýggja Testamentið. Hon byrjar við eini suru sum bert hevur sjey ørindi, og ljóðar soleiðis:

" Í navni Guds, hin miskunnsama og náðuga!

1. Lov og prís verið Gudi, alheimsins Harri,
2. Hin miskunnsami og náðugi,
3. Kongur av Dómadegi!
4. Bert teg tilbiðja vit og bøna um hjálp;
5. Leið okkum á rætta leið,
6. Tað leið sum hevur funnið náði í eygum tínum,
7. Sum ikki verða rakt av vreiði tíni og sum ikki villast av leið!"

Hesin inngangur til Koranina kann metast við kristna: "Faðir vár" og verður, saman við trúarjáttanini, javnan endurtikin.

### Teir fimm hornasteinarnir

Islam hvílir á 5 hornasteinum. Teir eru: 1. Trúarjáttanin, 2. Bønin, 3. Olmussan, 4. Føstan og 5. Pílagrímsferðin.

Trúarjáttanin er viðgjørd omanfyri.

Bønin kann verða biðin hvar tú enn er staddur. Bønarmottan, um hin biðjandi hevur nakra, verður rullað út, so at hin biðjandi vendir sær ímóti Mekka, og bønin verður borin fram undir ávísum fastløgdum knæføllum og bukkingum, har pannan viðhvørt nemur við undirlendið. Bønin kann vera fyrsta suran í Koranini og annars uttanatramsur av koranørindum. Hvønn dag verður biðið fimm ferðir. Ein av fríggjadagsbønunum skal um gjørligt verða biðin í eini mosku.

Olmussan er, umframt tað sum verður latið biddarum, 2,5 % av inntøkuni, sum fer til sjúk og fátøk, og er at meta sum eitt sosialt avgjald at reka almannaverkið fyri.

Føstan verður hildin í mánaðanum ramadan, sum er níggjundi mánaðin í muslimska mánaðaárinum. Tá má hvørki verða etið ella drukkið frá tí at sólin rísur til hon setir. Heldur ikki er kynslig samvera loyvd hesa tíðina. Undantøk eru loyvd. Tað er ikki neyðugt hjá sjúkum og børnum at halda ásetingarnar. Onnur undantøk eru eisini. Millum sólsetur og sólarris er alt loyvt sum vanligt. Tað við at ikki drekka, tá sólin er uppi, kann vera ein trupulleiki og ikki sørt vandamikið í heitum veðurlagi, og havi eg verið saman við fleiri muslimum, sum ikki hava tikið hesa áseting bókstavliga.

Pílagrímsferðin til Mekka eigur at verða gjørd av øllum muslimum, sum hava møguleika til tess, í hvussu so er eina ferð í lívinum.

Fleiri tættir eru í pílagrímsferðini. Hin fyrsti er at lata seg í pílagrímsserkin og at trína inn í halgaða salarró. Víkingarnir nevndu økini hjá kaliffinum í Miðeystri fyri Serkaland, tí at muslimar ofta ganga í serki.

Farið verður so til moskuna í Mekka, har rennast skal sjey ferðir kring Kabuna, og innmúraði svarti steinurin í henni skal hava ein koss. Seinni verður runnið millum heyggjarnar Safa og Marwa. Tá tað er av, savnast pílagrímarnir við fótin av fjallinum Arafa at lurta eftir prædiku sum verður hildin. Í lýsingini verður farið til Mazdelifa til eina vøkunátt. So verður farið til Mina har tríggjar steinrúgvur verða steinaðar. Tað verður rópt fyri at steina Satan. Og at enda verður offrað. Seyður og kamelar, sum verður etið undir eini offurmáltíð. Vanliga verður á eini pílagrímsferð til Mekka eisini vitjað á grøvini hjá Muhammed í Medina.

Sum sæst krevur islam munandi meira av sínum trúgvandi enn kristindómurin, ið bert hvílir á tveimum súlum, trúarjáttanini og ang-



Biðjandi muslimar, mynd Wikipedia